# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Listavirðisløn Miðlahúsins latin ólavsøkudag

Aftur í ár verður virðisløn latin til føroysk listafólk á tjóðardegnum. Talan er um Listavirðisløn Miðlahúsins, sum fyri fyrstu ferð varð latin í fjør. Tá fór hon til tveir kendar og avhildnar føroyskar tónlistamenn, Stanley Samuelsen og Hanus G. Johansen fyri teirra slóðbrótandi arbeiði til frama fyri tónleikin. Hesaferð verður virðislønin latin listafólki í aðrari listagrein. Hvørji og hvør fær hana verður avdúkað ólavsøkudag klokkan 14 við standmyndina av Nólsoyar Páll í Vágsbotni. Virðislønin verður latin til skapandi og útinnandi listafólk.

Miðlahúsið í Vágsbotni er annars eisini karmur um nógv onnur tiltøk ólavsøkudagarnar. Skráin er rættiliga fjølbroytt við tónleiki, filmsfyrivísan og framsýningum. Hetta er fimta árið, at Miðlahúsið letur dyrnar upp fyri almenninginum á ólavsøku. Tungvektarin er eingin minni enn okkara nógv virdi og avhildni Óli Petersen, sum fyri 21. ferð hevur framsýning við tekningum sínum í Sosialinum á ólavsøku. Í ár verður so eisini ein heilt nýggj framsýning. Tað eru fotomyndir, sum myndamaðurin hjá Sosialinum, Álvur Haraldsen hevur tikið á Oyggjaleikunum. Í báðum førum er gjørligt at ogna sær tekningar og myndir.

Afturvendandi táttur er eisini føroyskir filmir, sum hava vakt stóran áhuga millum ólavsøkugestirnar. Í fjør var Føroyskar Søgur 1 vístar í Miðlahúsinum, og í ár verða Føroyskar Søgur 2 vístar. Talan er um nøkur brot úr DVD, sum kemur út í heyst. Premiera av filmi og fernisering í sambandi við framsýningarnar verður í Miðlahúsinum mánadagin 27. juli klokkan 15.

Tónleikurin hevur eisini verið afturvendandi táttur í Miðlahúsinum á ólavsøku, og í ár verða fýra konsertir í Tórsgøtu 1. Hesar eru við Una Arge, Stanley Samuelsen og Hanus G. Johansen, Lív Næs og Niels Midjord og seinast Martin Joensen.

Eisini Rás2 er virkið um ólavsøkuna. Umframt at sent verður frá ólavsøkutiltøkum, so verður aftur í ár skipað fyri serligum tiltaki í Rásasúminum í ovastu hædd í Miðlahúsinum. Tað er ólavsøkukvøld klokkan 22, har fólkakæri bólkurin Frændir fara at spæla, og har Kári Cool fer at halda alternativu ólavsøkuróðuna.

**Sosialurin**

## Óskiljandi at alivinnan fær álagt víddargjald



**RAGNAR JOENSEN**
Formaður í Havbúnaðarfelagnum

Í Ólavsøkuuppskotinum hjá landsstýrinum verður lagt upp til, at alivinnan framyvir skal gjalda eitt víddargjald, sum verður mett til 12 milliónir árliga.

Havbúnaðarfelagið undrast stórliga á hetta uppskot, og sigur tað vera óskiljandi. Alivinnan er ein vinna, sum í dag virka fullkomiliga uttan almennan stuðul. Skulu eyka gjøld yvirhøvur leggjast á vinnuna, eigur hetta at verða gjørt á sama hátt fyri alla vinnu, og bert eftir at onnur vinna er stuðulsfrí og sjálv rindar síni eftirlitsgjøld.

Havbúnaðarfelagið ger vart við, at tað er umráðandi, at ein vinnugrein sum alivinnan, sum er sera kapitalkrevjandi, fær høvi at konsolidera seg, og at vinnugreinin forvinnur pening til menning av fyritøkuni fyri at kunna megna framtíðar avbjóðingar. Felagið metir, at landsstýrið við hesum tekur grundarlag undir framtíðarmenning av vinnugreinini.

## Aftursvar til Jóannes Ejdesgaard, fíggjarmálaráðharra, um ólavsøkupakkan og kommunurnar



**HEÐIN MORTENSEN**
Formaður, Kommunusamskipan Føroya

Jóannes Ejdesgaard finst at mær og Kommunusamskipanini, tí vit hava funnist at ávísum uppskotum hansara í ólavsøkupakkanum, heldur enn at viðgera tey saman við sær, so sum hann nú sigur seg hava ynskt.

Hetta er ikki rætt.

Kommunufeløgini vórðu við stuttari freist boðin til fund, har landsstýrismaðurin kunnaði um pakkan. Lagt varð ikki upp til nakra samráðing yvirhøvur hvørki á fundinum ella aftaná.

Vit fingu greitt at vita, at talan enn bert var um eitt samráðingarupplegg millum samgonguflokkarnar, og at aðrir partar, m.o. kommunurnar, fóru at verða tikin við í viðgerðina seinni.

Á fundinum tóku vit kunningina frá landsstýrismanninum til eftirtektar. Vit gjørdu tó eisini viðmerkingar til ávís uppskot - eitt nú um ætlaða lønarsteðgin, broytingar í partafelagsskattinum, umskipanin av Húsalánsgrunninum v.m.

Eitt nú fekk landsstýrismaðurin at vita, at uppskotið um at broyta býtið av partafelagsskattinum til fyrimunar fyri landskassan gongur beint øvugtan veg í mun til uppskot, ið kommunala umskipanarnevndin, sum ger tilmæli til ætlaða kommunureformin, arbeiðir við. Landsstýrismaðurin fekk tí eisini at vita, at uppskot hansara hevði ikki undirtøku í Kommunusamskipanini.

Vit gjørdu eisini viðmerkingar til, at nøkur uppskot vóru til fyrimunar fyri kommunurnar, onnur ikki.

Landsstýrismaðurin legði okkum eina við einki at siga um uppskotini alment, áðrenn samgongan var samd. Hetta ynskið hava vit virt til fulnar.

At landsstýrismaðurin nú hartar meg fyri at finnast at ávísum uppskotum alment heldur enn at koma til sín, er sanniliga løgin framferð, tí hann hevur greitt frábiðið sær okkara íkast.

Landsstýrismaðurin sigur seg heldur ikki skilja atfinningarnar og stóra orðavalið hjá Kommunusamskipanini. At talan er um fáar milliónir henda vegin og handa vegin.

Nú skal ólavsøkupakkin sjálvandi síggjast sum ein samrunnin partur av politikki landsstýrisins annars. Og ólavsøkupakkin, og serliga teir leysu pástandirnir, sum Fíggjarmálaráðið altíð brúkar sum grundgeving mótvegis kommununum, vátta bara enn einaferð, at kvørkratakið um kommunurnar verður hert stig fyri stig.

Hetta er tilgongd, ið hevur verið ávegis í eina tíð - og hetta er tilgongd, sum Kommunusamskipanin staðiliga ávarar ímóti.

Tað var eisini tí, at Kommunusamskipanin alment heitti á teg um at taka kommunurnar við í arbeiðið við pakkanum. Men tú strekti teg bert til eina kunning.

Kommunusamskipanin er altíð til reiðar at viðgera ólavsøkupakkan eins væl og øll onnur uppskot. Men so mugu kommunurnar eisini fáa veruliga ávirkan á ítøkiliga innihaldið.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.